# Tað fer ongantíð at henda

BILL JUSTINUSSEN
løgtingsmaður



Eg hoyri grannvaksnar politikkarar í fullum álvara siga, at ”vit fáa ikki steðgað rákinum í tíðini”, og at ”fyrr ella seinni fara vit eisini at hava bæði skrásett parlag fyri samkynd og loyvi hjá samkyndum at ættleiða børn osfr. í Føroym”. Hetta er ómegdartala og taparalyndi. At vita, at man hevur tapt, áðrenn veruligi bardagin er byrjaður, er kvalifikatión til at halda seg so langt burtur frá politikki, sum tilber.

**NEI**

Nei, onki hava vit tapt og onki fer skrásett parlag og allur annar hurlivasi at vinna fótafesti í Føroyum. Sokallaða ”glíðibreytina” nýtist als ikki at gerast veruleiki. Hvør ræður fyri tí? Tað ger Føroya fólk, sum er umboðað av Føroya løgtingi. Og ikki vænti eg, at tann dagurin upprennur, at ein samgonga fer at hava reinan meiriluta til at fremja slíka andstygd.

Tíverri vóru politikkarar í samgongu, sum vóru ímóti víðagitnu broytingunum í revsilógini, fullkomiliga skilaleysir seinasta heyst. Men tað hendir neyvan aftur. Teir 7 í samgonguni kundu sum onki havt steðgað § 266b, men av onkrari óskiljandi orsøk gjørdu teir tað ikki. Helst svav onkur teirra í tímanum, meðan aðrir royndu at vekja teir. Vónandi lærdi tað málið okkum, at á Løgtingi eru til eina og hvørja tíð nóg nógv fólk til at halda avkristnanini aftur. Tað einasta, sum krevst, er, at teir, sum sita í samgongu, taka seg saman og siga NEI. Tað sigst bera væl til í øðrum minni týdningarmiklum málum, so hví ikki í hesum so sera týðandi máli, sum snýr seg um sjálva sálina í fólkinum.

Í seinastu samgongu bar væl til at halda serlóggávu fyri samkynd burturi. Tá segði Miðflokkurin NEI, og meira varð ikki burtur úr tí. Tað ber eisini til í hesi samgongu og í mongum komandi. Eitt eru nógvir føroyskir politikkarar yvir um floksmørk samdir um: vit hava eitt gott samfelag fyri øll, sum byggir á kristna grund, og hendan grundvøll skal ongin sleppa at skeikla.

**LYGNIN**

Lygnin er eitt týðandi amboð í framtøkunum fyri søk teirra samkyndu. Eitt gott dømi eru orðini, sum fólkatingslimurin Mogens Jensen hótti við til seinasta norðurlandaráðsfund. Hann segði nevniliga, at so leingi, sum Føroyar ikki virdu mannarættindini (og tá meinti hann við 266b), var óhugsandi at fáa fullgyldugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Slíkar grundgevingar vóru eisini vanligar undir orðaskiftinum í Føroyum. Men hetta var bara enn ein hent undanførsla fyri at trýsta politikkarar, og enntá løgtingsformaðurin læt seg trýsta. Lygn var tað, tí vit eru als ikki komin nærri einum fullgyldugum limaskapi í Norðurlandaráðnum av teirri orsøk.

Ein onnur vanlig lygn er, at altjóða eygu eru vend móti okkum, um vit veita samkyndum teirra serrættindi. Hetta er milt sagt møsn og tvætl. So áhugaverdar eru Føroyar altso ikki, at allur heimurin stendur og eygleiðir okkum, um vit nú munnu bera sjálvútnevndar minnilutabólkar á lógvum ella ei. Etisk lóggáva er so sera ymisk landanna millum, og vanligt er, at londs als ikki taka dagar ímillum tílíkar innanhýsis spurningar hjá hvørjum øðrum.

Og so verður spurningurin hevjaður upp til at kallast mannarættindi. Hetta hevur als onki við mannarættindi at gera, um samkynd kunnu skráseta sítt parlag ella ei. Tað í sær sjálvum er grov manipulatión. Mannarættindi snúgva seg í alheims politikki um t.d., hvussu farið verður við fangum, um deyðadómur er galdandi, um kvinnukúgan, um barnatrælaarbeiði, um handil við børnum og kvinnum osfr. Ein og hvør skilir, at tað er munur á at stríðast fyri at loysa børn úr trældómi og sleppa fólki undan píning og deyðadómi, og so at útvega samkyndum í einum fríum og frælsum landi serliga luksuslóggávu. Í sær sjálvum er tað ein lygn at samanbera hendan luksustrupulleikan við støðuna hjá kúgaðum, niðurpíndum og ófrælsum um allan heim.

Størsta lygnin av øllum er, at í Føroyum verða samkynd happað og forfylgd, og at tey tí verða noydd at flyta av landinum. Man høvuðsorsøkin flytingina ikki heldur vera, at úrvalið av samkyndum í Føroyum ikki er serliga stórt? Tað er tað heldur ikki aðrastaðni, og tí er tað vanligt mynstur, at tey flyta til stórbýirnar, so tey har kunnu skapa eitt umhvørvi eftir teirra høvdi. Flestu samkyndu, sum eg havi tosað við, siga seg hava tað gott í Føroyum. Eg kenni aðrar bólkar, sum hava tað minni gott í Føroyum, men sum hvørki ganga skrúgongu, hava ráðstevnur ella flyta av landinum. Sum viðhaldsfólk teirra samkyndu nú føra seg fram við skrúgongum og ráðstevnum fyri stútt og støðugt at trútta niður í alt og øll, at samkynd eru til og vanta samkenslu, undirtøku og góðtøku frá øllum, kunnu tey rokna við øvutum úrsliti. Tað eru altso ikki øll, sum tíma at hoyra um hesar kynsligu samleikarnar.

Ein onnur lygn varð borin fram av løgreglumanni, sum segði, at ikki bar til at verja ein samkyndan, sum varð álopin í Havnini. Fyri fáum døgum síðani hevur eitt rættarmál verið um júst hetta málið. Og tann seki varð dømdur, júst tí at lógar-heimild var fyri hesum. Hvørji grein í revsilógini var hann dømdur eftir? Neyvan 266b.

Og hesi dømi eru bert hissini úr rúgvuni. Tá lygnin verður nýtt sum amboð, er tað tí at sannleikin ikki kann brúkast. Men tá lygnin verður avdúkað, missir málið sítt trúvirði. Tey samkyndu, sum eg kenni persónliga, virði eg á jøvnum føti við øll onnur menniskju, tí tey eru jú so ómetaliga nógv annað enn samkynd. Og eg kenni tey ikki sum ótrúverdug. Tí harmar hendan afturvendandi propagandaherferðin meg nógv teirra vegna, tí hon er til størri skaða enn gagn. Men uttan mun til, hvussu herjað verður á framyvir, fer Miðflokkurin at luttaka og grundgeva.

# Fólkakirkjans nye biskop má være en rigtig færing!

MOGENS TILSTED CHRISTENSEN
Sognepræst på Nordstrømø præstegæld



Den nye og selvstændig folkekirke på Færøerne lægger ud med at ordinere 2 nye præster allerede den anden søndag efter kirkens fødsel.

Og hermed hører det ikke op. Nu i denne måned udtages kandidaterne til bispevalget. Inden den 3. september vil kandidaterne være klar.

Det er særdeles betryggende, at menighedsråd og præster kender kandidaterne her på Færøerne. For der kan ikke være tvivl om, at den biskop må være en færøsk indfødt præst.

Kravene for at blive opstillet er, at man har en teologisk embedseksamen fra Danmark.

Men for det færøske samfund vil det også være betryggende, at man vælger en færøsk præst.

Hvorfor siger jeg nu de? Det gør jeg, fordi Færøerne er et samfund i en rivende udvikling såvel på uddannelsessiden som på den økonomiske dimension.

For et samfund i udvikling er en sand troende kirke langt vigtigere, end mange er klar over. Her kan vi gribe til at lære af andres dårlige erfaringer. I alle Færøernes nabolande har kristendommen lidt skibbrud på bekostning af udviklingen.

Det ikke godt. Hvad hjælper os nede fra Europa, at vi har gods og guld, når vores kirker har verdsliggjort sig ud i den rene fortabelse for mange mennesker.

Kampe er kæmpet, men løgn, vildfarelse og forførelser fik overtaget. I Danmark blev der indført særlige ritualer i to store stifter (Ålborg og Århus), som aldrig skulle have været indført i en kristen kirke.

Men de herrer biskopper i Ålborg og Århus stifter kan nu slet ikke få nok. De vil også have indført direkte vielser af homoseksuelle i deres kirker.

Tilsvarende katastrofale tilfælde sker desværre også i andre af vore nabo-kirker.

På denne baggrund er det en forpligtelser for det færøske samfund, at det må forblive i den positive kristne ånds ledelse, som hidtil er sket.

En ting er, at kirken nu bliver politisk. Det forpligter jo også politikerne. Derfor er det vigtigste af alt nu på Færøerne, at vi får valgt en god, troende, ansvarlig og mod kristen biskop, som har sit familiebagland i orden.

Det har de fleste færøske præster jo også, og derfor må vi håbe, at de nye biskop hentes af det færøske præstekollegium blandt de præster, som kompromisløs vil stå fast på Guds Ord Bibelen.

Der findes nemlig kræfter på Færøerne godt hjulpet af en vis dansk kunstner, der træder frem med budskabet Bibelfrit Færøerne. Desværre har et par unge uvidende musiker o. l. ikke gennemskuet bedrag et. Men de må alle være tilgivet, de ved ikke, hvad de gør. VI må håbe, at at de omvender sig, inden Færøerne få dansklignende tilstande på dette område.

En færing, der er præst i Danmark har for kort tid siden udarbejdet en studierapport over kirkegangen i Danmark, Frankrig og Færøerne.

Danmark og Færøerne har ca. 80% af befolkningen som medlemmer. Mens Færøerne mønstrer en normal kirkegang på 23 %, så er den tilsvarende i Danmark 2 %. Frankrig lå midt imellem med 10%.

Derfor er mit opråb og mit håb, at den færøske folkekirkes nye biskop bliver en indfødt færing.

Når menighedsrådsmedlemmer har spurgt og opfordret mig til at stille op som bispekandidat, hvilket er sket et par gange, så har jeg takket nej med den begrundelse, som heroverfor er anført. Færinger kan godt selv, når det gælder det kristne kirkeliv.

Det er I nemlig meget bedre til, end de er i Danmark, så hvorfor skulle end dansker så være biskop i den nye selvstændige færøske folkekirke?

Tillykke med den og må Gud velsigne Færøerne med en rigtig god troende færøske biskop, som kender sit land fra barnsben.

Med venlig hilsen
www.TEOLOGEN.DK

# Heteroseksuelli riddarin Alfred Olsen

Finnur Helmsdal
løgtingsmaður



Alfred Olsen, løgtingsmaður roynir enn eina ferð at reingja veruleikan, við at leggja mær og flokki mínum orð í munnin. Hann er kanska við at mynda seg sjálvan sum ein nýggjan Sigmund Brestisson, ið skal standa sum ein drangi móti vkristnanini av landi okkara. At hann nýtir grovar lygnir og beinleiðis villleiðir, tykist ikki nerva henda merkismannin, alt slíkt hevur einki at siga, tí hann er ein heilagur avhaldsmaður. Tími ikki at øsa meg meira enn neyðugt er yvir politiska deyðsiglaran av Toftum. Havi bert hesa viðmerkingina:

Í Føroyum hava vit nógvar riddarar, men munnu heteroseksuellu riddararnir vera teir, sum manna ovasta lagið av aðalstætt okkara. Soleiðis sum Alfred Olsen ber seg at, telist hann uttan iva millum teirra. Tí kann tað undra, at maðurin er so altráður altíð at loypa á menn aftanífrá.